Gjørt avtalu við Gazprom

Aðalstjórarnir í russiska Gazprom og norska Statoil Hydro, Aleksej Miller og Helge Lund, hava skrivað undir eina avtalu, har feløgini siga seg vera til reiðar at samstarva í teimum norðaru økjunum hjá báðum londunum. Sambært avtaluni kann samstarvið umfata bæði leiting eftir olju og gassi, framleiðslu og flutning. Teir báðir aðalstjórarnir siga í einum tíðindaskrivi, at tá havt verður í huga, hvussu nógv olja og gass eftir øllum at døma er í tí arktiska økinum, gevur avtalan um samstarv báðum feløgunum sera stórar møguleikar. Nýggja avtalan avloysir eina avtalu, sum Gazprom og StatoilHydro hava havt síðani 2005.

Ferðafólk rýma frá SAS

Kreppan hjá skandinaviska flogfelagnum SAS vil ongan enda taka. Felagið hevur nú kunngjørt, at tað flutti meiri enn 400.000 færri ferðafólk í síðsta mánað enn í mai í fjør. Tað er ein afturgongd upp á heili 18,6 prosent. Mats Jansson, aðalstjóri, sigur, altjóða figgjarkreppan og hørð kapping frá lágprísfeløgunum hava noytt SAS at lækka ferðaseðlaprísin, og hann ásannar, at útlitini fyri teir næstu mánaðirnar eru ikki tey bestu. Leiðslan í SAS hevur sett fleiri sparitiltøk í verk tað seinasta árið, og aðalstjórin útilokar ikki, at tað kann gerast neyðugt við fleiri tiltøkum.

Lønarniður-skurður bjargaði P/F Poul Michelsen

Fyri 17 árum síðani, tá Føroyar var um at fara av knóranum, leikaði eisini á hjá heilsøluni P/F Poul Michelsen. Valið stóð millum at byrja at siga fólki upp, og so kanska enda við at standa við ongum, ella at geva teimum 20 fólkunum eitt heilt serligt tilboð. Eitt tilboð, har 10 prosent av lønini fór í eitt slag av sparigrunni. Tiltakið eydnaðist, og í dag arbeiða nærum 70 fólk í fyritøkuni, sum er væl fyri at taka ímóti núverandi kreppuni

SPARINGAR

Orð & Myndir: Leif Láadal

Vit eru í 1992. Árið er ikki hálvrunnið, og bankarnir síggja á skræðuni út til at hava tað gott. Men tað er nógv sum bendir á, at ikki alt ruggar rætt í samfelagnum. Tær fyrstu fyritøkurnar hava snara lyklinum, eisini fyritøkur, sum sóu út til at vera væl fyri.

Á skrivstovu síni við Hoyvíksvegin situr stjórin Poul Michelsen og fyrireikar ein týdningarmiklan starvsfólkafund – ja, í veruleikanum tann týdningarmiklasta fundin, sum hann higartil í sínum lívi skal halda. Tað snýr seg nevniliga um at halda lív í lívsætlan síni. Tað snýr seg um at bjarga heilsøluni P/F Poul Michelsen (PM).

Arbeiða seg úr kreppuni

Sólin skínur hendan hósdag fyrst í juni. Vit skriva nú 2009, og tað eru eftirhondini 17 ár síðani, at Poul Michelsen helt omanfyrinevnda fund. Men tað er kortini okkurt, sum er eins. Samfelagshjólini eru aftur farin at mala seinni. Tað, sum byrjaði sum ein figgjarkreppa í USA fyri hálvum øðrum ári síðani, hevur nú breitt seg, og er í dag nærum at meta sum ein altjóða búskaparkreppa.

Fyri tveimum mánaðum síðani var aftur týdningarmikil starvsfólkafundur hjá PM við Hoyvíksvegin. Men sjálvt um evnið var tað sama – "hvussu takkla vit kreppuna" – so var uppskotið frá leiðsluni ikki tað sama sum í 1992. Hesaferð skal eingin niður í løn. Felagið er nú somikið væl fyri figgjarliga, at tað ber til at arbeiða við øðrum enn sparingum, tá táttast skal í.

– Ja, tú kann siga, at vit hesaferð vilja arbeiða okkum burturúr støðuni, heldur enn at spara okkum burturúr henni, sigur Poul Michelsen, sum í dag er forstjóri í fyritøku síni. Afturat sær hevur hann stjóran Gunnar Mohr, umframt eini 65 starvsfólk.

Bjargingarætlan

Øll starvsfólkini møta til fundin í 1992. Teimum dáma væl at arbeiða hjá PM, og tað er ein sera torfør uppgáva at skula út á arbeiðsmarknaðin at leita sær eftir einum nýggjum starvi, tí arbeiðsloysið er eksploderað í Føroyum hetta árið.

– Tá vit hoyrdu um uppskotið hjá Poul, var bara ein, sum segði frá, at hann ikki tímdi at fara niður í løn, fortelur Petur Hermansen.

Petur er tað av starvsfólkunum, sum hevur verið longst hjá PM. Hann byrjaði

Gunnar Mohr (v.m), núverandi stjóri, byrjaði at feia á goymsluni hjá PM fyri júst 30 árum síðani. Petur Hermansen (m.f.) hevur arbeitt hjá PM í 34 ár. Poul stovnaði virki sítt í 1974

Fylgt verður væl við. Her fegnast teir um eina nýggja deild á goymsluni við góðum kryddi